# Fíggjarmálaráðið og »rúmligi arbeiðsmarknaðurin«

INGRID S. HENRIKSEN
fyrrverandi nevndarlimur í almennum fakfelag



**Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum leggur í útkasti til “vegleiðing um løn undir sjúku” upp til, at almennir arbeiðsgevarar skulu siga varandi sjúkum úr starvi:**

Varð ikki sørt skelkað, tá eg las “útkast til vegleiðing um løn undir sjúku”, har lønardeildin hjá Fíggjarmálaráðnum mælir til, at starvsfólk, ið verða mett ongantíð at gerast frísk aftur, eftir stutta sjúkrafráveru, skulu sigast úr starvi.

Í skrivi, dagfest hin 12. november 2008, hevur lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum sent fakfeløgunum á almenna arbeiðsmarknaðinum “útkast til vegleiðing um løn undir sjúku” til viðmerkingar. Í hesum útkasti leggur lønardeildin hjá Fíggjarmálaráðnum upp til at varandi sjúk/kroniskt sjúk skulu koyrast av arbeiðsmarknaðinum. Undir punkti 3.6 í útkasti til “vegleiðing um løn undir sjúku” verður m.a. sagt:

*“...Atlit verða t.d. tikin til, hvussu nógv sjúkan tyngir raksturin, hvussu langa starvstíð starvsmaðurin hevur og longdina á sjúkuni.*

***Um starvsmaður verður mettur ongantíð at gerast frískur aftur, er hetta nóg mikið at grunda eina uppsøgn, hetta sjálvt um viðkomandi bara hevur havt stutt forfall.”***

Tað er heilt burturvið, at lønardeildin hjá Fíggjarmálaráðnum kemur við tilráðing um at siga fólki við kroniskum, varandi sjúkum úr starvi (starvsmenn, ið ongantíð gerast frískir aftur). Um tilráðingin hjá lønardeildini verður sett í verk, fer hetta óivað í næstum at hava við sær, at hópur av starvsfólkum, ið eru ella verða rakt av varandi kroniskari sjúku, verða søgd úr starvi og missa arbeiðið og harvið fíggjarliga tilverugrundarlagið.

Starvsfólk, ið fáa kroniskar sjúkur so sum giktasjúkur, krabbamein, sjúkur í nervalagið, diabetes, Parkinson sjúku og mangar aðrar kroniskar sjúkur, kunnu, um henda tilráðing hjá lønardeildini hjá Fíggjarmálaráðnum verður sett í verk, rokna við at verða uppsøgd og missa arbeiði. Lønardeildin leggur við síni tilráðing um uppsøgn av starvsfólki, ið hava ella verða rakt av varandi kroniskari sjúku, stein oman á byrðu hjá hesum sjúkraktu starvsfólkum, ið ofta longu frammanundan hava tað trupult bæði heilsuliga, sosialt og fíggjarliga.

Tilráðingin hjá lønardeildini hjá Fíggjarmálaráðnum er ikki í tráð við tað, sum ABC samgongan sigur um rúmliga arbeiðsmarknaðin, ella tað, sum Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, meldar út um rúmliga arbeiðsmarknaðin. Í samgonguskjalinum hjá ABC samgonguni verður nevniliga boðað frá, at:

*“ Arbeiðsmarknaðurin skal gerast rúmligari við at gera betri skipanir m.a. um vard størv og endurbúgving, so fólk við skerdum førleika fáa betri atgongd til at verða virkin á arbeiðsmarknaðinum og í samfelagnum annars.”*

Somuleiðis verður í samgonguskjalinum sagt um rúmliga arbeiðsmarknaðin, at:

*Almenni setanar- og starvsfólkapolitikkurin skal eisini viðvirka til hetta, eins og almenn arbeiðspláss yvir ávísa stødd skulu binda seg til at taka fólk í vard størv.”*

Punkt 3.6 í útkasti til “vegleiðing um løn undir sjúku” gongur soleiðis beint ímóti tí, sum ABC samgongan fráboðar um rúmliga arbeiðsmarknaðin í samgonguskjalinum millum Sambandsflokkin, Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin.

Rósa Samuelsen vísir í skrivi um rúmliga arbeiðsmarknaðin á heimasíðuni hjá Almannamála-ráðnum, dagfest hin 20. oktober 2008, á, at:

“Yvirskipaða málið við rúmliga arbeiðsmarknaðinum er, at rúm skal vera fyri øllum á arbeiðsmarknaðinum – eisini persónum við breki, sjúku ella sosialum trupulleikum.”

Rósa Samuelsen vísir somuleiðis á, at fyribyrgjandi tiltøk eiga at vera sett í verk, soleiðis at starvsfólk, ið gerast sjúk, ikki missa tilknýtið til arbeiðsplássið ella arbeiðsmarknaðin, og at arbeiðs-pláss í slíkum førum eiga at vísa serlig atlit, soleiðis at arbeiðsuppgávur vera tillagaðar til tann sjúkurakta, ella at almennar stuðulsskipanir verða nýttar í tann mun, tað er neyðugt.

Vert er somuleiðis at bíta merki í, at Almanna- og Heilsumálastýrið í 1999 gav út ST- “Fyrimyndarreglur um at útvega **javnlíkar møguleikar fyri brekað fólk**”. Hesar fyrimyndarreglur vórðu í 2004 útgivnar av nýggjum av Almanna- og heilsumálaráðnum, har Hans Pauli Strøm, fyrrverandi landsstýrismaður í Almanna- og heilsumálum, í fororðum sínum sigur: “tað er uppgávan hjá politikarunum at skapa tær neyðugu rammurnar fyri, at fyrimyndarreglurnar verða fylgdar. Tað er politiski myndugleikin, sum hevur møguleika fyri og ábyrgd av at fremja fyrimyndarreglurnar í verki”. Á síðu 23 í 7. reglu um arbeiði í ST-fyrimyndarreglunum er ásett, at “Lógir og reglugerðir á arbeiðsmarknaðinum mugu ikki gera mun á fullførum og brekaðum fólki, og mugu ikki forða teimum brekaðu at fáa arbeiði”.

Tískil átti at verið púra greitt, at lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum ikki eigur ella kann seta í verk punkt 3.6 í “vegleiðing um løn undir sjúku”, ið mælir til uppsøgn av varandi sjúkum starvsfólkum, men eigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jóannes Eidesgaard, ið varðar av lønardeildini, hinvegin at syrgja fyri, at lønardeildin setir í verk starvsfólkapolitikk, ið vísir til, at arbeiðspláss skulu vísa sosiala ábyrgd yvir fyri varandi sjúkum starvsfólkum. Starvsfólkapolitikk, sum tryggjar, at pláss eisini er fyri starvsfólkum, ið hava varandi og kroniskt sjúku, hetta soleiðis at hesi starvsfólk ikki verða uppsøgd grundað á sjúku, men hinvegin verða náturligur og sjálvsagdur partur av arbeiðsmarknaðinum.

# Sáttmálin við russar - ein skandaløs katastrofa

ATLI HANSEN
Gøtu



“Vit fara eftir øllum”, rópti landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum so hart, at tað hoyrdist til Ruslands. Og vit hava ov mikið av makreli at gjalda við, nú svartkjafturin minkar. So tit kunnu bara sjálvir áseta prísin. Vit taka av.

Síðani tað kom fram, at Føroyar fóru at fáa 7000 tons meira av makreli í sín part, nú TAC`ið varð hækka, hevur landsstýrismaðurin verið í fjølmiðlunum dag og dagliga við hesi fráboðan og nærmast goldið áðrenn vit fingu nakað afturfyri. Sera ótaktisk framferð. Eingin grund at órógva fólk við at fara til Archangelsk til samráðingar. Alt kundi verið gjørt sum eitt SMS.

Og eg eri væl nøgdur, sigur landsstýrismaðurin. Hvør leggur í hvat íð hann er nøgdur? Var tað ikki betur um øll vinnan ella allar Føroyar vóru nøgd? Hansara motivir til at vera nøgdur kunnu vera so mong.

Vit hava fingið 1600 t av toski og 200 t av hýsu afturat í Barentshavinum. Vit hava goldið við minus 20.000 t av svartkjafti + 4100 t av makreli. Tað er lítið at rósa sær av.

Vit høvdu frammanundan ein sáttmála sum í ólukkumát var til russiskan fyrimun og sama okursprís hava vit nú aftur goldið fyri at fáa hesi tonsini afturat. Og tað til ein flota, sum ikki hevur brúk fyri teimum. Ella kanska er tað ikki teir, sum skulu hava vøksturin í kvotuni?

Áðrenn farið var til Ruslands til samráðingar, varð sum vanligt kallað til forfund í Fiskimálaráðnum fyri at vinnan kundi siga landsstýrismanninum sína hugsan. Tíðindi frá hesum fundi vilja vera við, at landsstýrismaðurin lítið legði í at lurta eftir teimum vinnuumboðunum, sum royndu at siga nakað. Alt tyktist at liggja fast longu tá. Fregnast varð frá umsitingini eftir nøkrum hagtølum fyri virðisøking ella virði á kvotum. Hetta hevur Fiskimálaráðið havt 10 – 15 ár til at finna fram. Bæði Havsbrún og Felagið Nótaskip hava gjøgnum árini framleitt nógv tilfar um hetta og sent landsstýrinum. Eisini Fiskirannsóknarstovan gjørdi í síni tíð eitt yvirlit yvir kvotavirðir. Alt er gjørt. Tað er bara at fara eftir tí.

Smb. lógina um vinnuligan fiskiskap, so eri eg medeigari av hesum virðum, sum landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum so fyrilitarleyst jonglerar við og eg ivist í um hann klárar at møta lógini um ábyrgd landsstýrismanna í hesum málinum. Eingin náttúrulóg sigur, at fyri tí at toskakvotan fer upp í Barentshavinum, so skulu vit tøma bókina fyri at keypa meira av hesum. Ella er landsstýrismaðurin kanska við hesum í ferð við at leggja upp til at lata 1 ella 2 loyvir afturat í Barentshavinum? Tað hevði verið at ført politikk.

Kanska átti Løgtingið aftur at kravt sáttmálarnar til góðkenningar í Tinginum. Har er í minsta lagi ein nevnd íð eigur at hava eftirlit vit landsstýrismonnunum, men sáttmálar um fiskirættindir er helst ikki tann mest spennandi lesnaðurin.

# Als ikki samband millum rúsdrekka og føroyskan dans

***Tíðindaskriv***

Í sambandi við at føroyskur dansur er komin á etikettina á nýggjum rúsdrekka, loyvir Sláið Ring sær at koma við nøkrum viðmerkingum.

Sláið Ring dámar sera væl, tá ið føroyskur dansur verður brúktur í sambandi við tað, ið føroyskt er. Kemur ein orðabók, skúlabók, sangbók, fløga, ferðavinnubók og líknandi út við dansinum á, frøast vit almikið. Tað er so upplagt, at føroyski dansurin og kvæðamentanin verða brúkt at vísa eitt sereyðkenni úr landi okkara.

Hinvegin síggja vit als ikki sambandið millum rúsdrekka og føroyskan dans, annað enn at í vertskapi eru bæði umboðað.

Limafeløgini í Sláið Ring eru 16 í tali. Flestu teirra dansa hvørja viku frá heystinum og til føstulávint. Ongastaðni er rúsdrekka partur av dansinum.

Hava feløg veitslur, tað verið seg fótbólts-, hondbólts-, kappróðrar- og dansifeløg, er øðrvísi. Tá kann rúsdrekka vera við sum partur av veitsluni. Hetta er galdandi fyri flestu feløg og tí ikki serstakt fyri dansifeløg.

Í meir enn hálva øld hava dansifeløgini hildið rúsdrekka burtur frá dansinum í feløgunum. Sláið Ring vil taka frástøðu frá, at fólk við peningaligum áhugamálum royna at tvinna dansin og rúsdrekka saman.

Føroyskur dansur er nógv bestur við edrúum fólki. Tað skuldi verið hvørs manns vitan. At hetta verður misskilt av fólki, vísir betur enn nógv annað, hvussu ósjónligur dansurin er millum manna, og hvussu lítla vitan nógv hava um føroyska dansin.

Sláið Ring vil við hesum heita á okkum øll, ikki minst Kringvarpið og aðrar miðlar, dansifeløg og Mentamálaráðið: Latið okkum varpa ljós á sermentan okkara. Tað er ósømiligt, at kvæðamentanin í hesum upplýsingartíðum skal verða so mistulkað.

***Sláið Ring - landsfelag føroyskum dansi at frama***